umhvørvisstovan

LM-099/2025

Til Tilfeingis- og vinnumálaráðið

Argir hin 2. februar 2026
Málsnr.: 25/33457
Málsviðgeri: TJ, SH

Hoyringarsvar til uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. (Heimildin at skjóta grágás verður longd)

Umhvørvisstovan, sum er náttúrumyndugleiki, hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Grágás er búfuglur, umframt flyti- og vetrargestur. Grágás, sum sæst í Føroyum, er partur av einum stovni, sum fevnir um búfugl í grannalondum okkara, m.a. Íslandi og Bretlandi. Ferðing hjá grágás er viðkomandi fyri stovnsfyrisiting tvørtur um lond.

Grágás er vard í ES sum villur fuglur, har veiða er treytað av, at hon er burðardygg. Í Íslandi, Bretlandi og Danmark er veiða av grágás loyvd ávísar tíðir á árinum. Tað hevur týdning, at veiða verður avmarkað til ávíst tíðarskeið, og ikki fer fram í bútíðini ella tá grágás missur fjaðrarnar.

Hartil er grágás fevnd m.a. av Bonn-sáttmálanum (Convention on Migratory Species of Wild Animals), sum áleggur londum eina altjóða skyldu mótvegis flytifugli.

Mett verður, við støði í grágásateljingum[1], at føroyski grágásastovnurin liggur um 400 pør, og er sostatt lutfallsliga lítil. Føroyski grágásastovnurin er fyrr vorðin avoyddur, og ein veiða uttan nøktandi fyrisiting kann elva til niðurgongd í grágásastovninum.

Umhvørvisstovan metir tað hava stóran týdning fyri stovnsfyrisiting av grágás, at nøktandi grundarlag er fyri metingum av stovnsstøðu og stovnsgongd. Fyri at fáa eina nøktandi stovnsfyrisiting er tørvur á vitan um, hvussu grágás ferðast, umframt at tal á veiddum fugli verður skrásett og at árligar teljingar halda áfram.

Umhvørvisstovan metir, at tað við støði í verandi vitan ikki er nøktandi grundarlag til at meta um ávirkan av veiðu á grágásastovnin.

[1] Hansen, L. J. & Aldará, J. 2025. Grágæs í 2024 – Uppgáva framd fyri Búnaðarstovuna", Landdjóradeildin, Tjóðsavnið

Jensen, J-K. & Sørensen, S. 2015. Færøernes fugle – fakta og tal / Birds of the Faroe Islands – facts and numbers, Forlagið í Støplum, Tórshavn, Faroe Islands

Umhvørvisstovan vil fegin svara spurningum og ivamálum. Vinarliga setið tykkum í samband við okkum, um tit hava tørv á fleiri upplýsingum ella nágreiniligum viðmerkingum.

Vinarligar heilsanir

Sigga Jacobsen

Deildarleiðari, Vernd